ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3, Postboks 208
110 Tórshavn

7. juni 2022
Mál: 22/10363
Tygara Skriv:
Viðgjørt: HP

Nr. 52-199/2021

Svar upp á § 52a fyrispurning nr. 52-199/2021 frá Bjørt Samuelsen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í almannamálum Sólvit E. Nolsø, um familjur og børn í fátækraváða

Spurningar:

1. Hvussu stór inntøka krevst hjá einum húsarhaldi, fyri at hava nóg nógv at liva fyri við dagsins hækkandi prísstøði?
2. Nær verður ein familja ella persónur mettur at liva á ella undir fátækramarkinum?
3. Hvussu nógvar familjur og persónar í Føroyum kunnu í løtuni metast at liva í fátækt ella í fátækraváða, og hvussu mong børn teljast millum hesi?
4. Hvussu nógvar familjur og persónar metir landsstýrismaðurin hava tørv á bráðfeingis ella varandi fíggjarligum stuðli fyri at kunna liva eitt sømiligt lív?

Svar

1. *Hvussu stór inntøka krevst hjá einum húsarhaldi, fyri at hava nóg nógv at liva fyri við dagsins hækkandi prísstøði?*
   Í viðmerkingunum til spurningin vísir spyrjarin til álitið frá 2014 um eitt føroyskt fátækramark. Í sambandi við álitið framleiddi arbeiðsbólkurin handan álitið eitt sokallað minstabúskett. Endamálið við minstabúskettinum var at vísa, hvat skal til fyri at fáa ein gerandisdag at hanga saman, tá ongir snávingarsteinar eru í vegin.

   Arbeiðsbólkurin gjørdi vart við eina rød av fyrivarnum í sambandi við minstabúskettið, ásannandi at hvør familja hevur ymiskan tørv. Familjutýpurnar í sambandi við minstabúskettið vóru lýstar ástøðiliga, og víst var á, at tað helst ikki finst nøkur familja, sum neyvt kennir seg aftur í minstabúskettinum. Lýsing av fátækradømi eftir búsketthátttinum var eitt boð uppá eitt stutttíðarbúskett, og var partur av álitinum men var ikki partur av endaliga fátækramarkinum, sum arbeiðsbólkurin mælti til. Uppgerðin er ikki gjørd síðan.

2. *Nær verður ein familja ella persónur mettur at liva á ella undir fátækramarkinum?*
   Eins og flestu lond í heiminum hava Føroyar ikki eitt alment fátækramark, og tí ber ikki til at svar spurninginum.

3. *Hvussu nógvar familjur og persónar í Føroyum kunnu í løtuni metast at liva í fátækt ella í fátækraváða, og hvussu mong børn teljast millum hesi?*

   Tað ber ikki til at siga, hvussu nógv í løtuni liva í fátækt ella í fátækraváða. Hagtølini fyri 2022 um fátækraváða eru ikki tøk fyrr enn í 2024. Nýggjastu hagtølini um fátækraváða, ið eru tøk á heimasíðuni hjá Hagstovuni, eru fyri 2019 (landsstýrismaðurin hevur fingið upplýst, at tøl fyri 2020 væntandi verða almannakunngjørd í viku 23).

   Í 2019 vóru 7,7% av føroyingum í fátækraváða, meðan 7,9% av børnunum vóru í fátækraváða. Hagstovan almannakunnger ikki hagtøl um fátækraváða í trý ár á rað og harvið, hvussu nógv eru undir fátækramarkinum, sum arbeiðsbólkurin um fátækramark mælti til at brúka.

   Í 2019 vóru gott 1000 børn í Føroyum í fátækraváða.

   Fátækraváði og fátækradømi eru tvey ymisk hugtøk. Av tí at hagtøl um fátækraváða altíð eru forskotin við umleið tveimum árum, ber ikki til at siga, hvussu nógv í løtuni eru í fátækraváða. Sum nevnt omanfyri finnast í Føroyum heldur ikki hagtøl um fátækradømi, og tí ber ikki til hjá landsstýrismanninum at siga, hvussu nógvir føroyingar liva í fátækradømi.

4. *Hvussu nógvar familjur og persónar metir landsstýrismaðurin hava tørv á bráðfeingis ella varandi fíggjarligum stuðli fyri at kunna liva eitt sømiligt lív?*
   Landsstýrismaðurin skilir spurningin soleiðis, at spyrjarin ynskir at vita, hvussu hækkaða prísstøðið ávirkar tørvin á fíggjarligum stuðli. Men spyrjarin knýtir spurningin saman við tað at hava eitt sámiligt lív. Tað ber ikki til á ein objektivan hátt at siga, hvat er eitt sámiligt lív, og tað, sum eg sum landsstýrismaður meti verða sámiligt, er ikki neyðturviliga tað sama, sum onnur halda vera sámiligt.

   Prístalið er hækkað úr 123,2 fyrsta ársfjórðing í 2021 upp til 128,6 fyrsta ársfjórðing í 2022, sum er ein lutfalsliga stór hækking. Men tað er sera stórur munur millum ymsu vørubólkarnar, har serliga prísir í sambandi við bústað so sum húsaleiga, brenniolja, viðlíkahald, ravmagn og hiti o.t. er hækkað ógvusliga. Prístalið á flestu vørubólkum eru hækkað nakað meira enn vanligt, meðan nakrir vørubólkar sum so ikki eru hækkaðir.

   Tað er sostatt rættiliga ymiskt, hvussu føroysku familjurnar verða raktar. Tað er sum nevnt tey við lægstu inntøkunum, sum í størstan mun merkja príshækkingarnar, men tað kann ikki avmarkast til ávísar bólkar.

   At hava ein bráðfeingis tørv á fíggjarligum stuðli er beinleiðis tengt at inntøkum og útreiðslum. Útreiðslupartin ber ikki til at síggja í nakrari ávísari skrá og er ikki tengt at ávísari veiting ella ávísari sosialari støðu. Fíggjarligi stuðulin til stakar uppihaldarar er hækkaður munandi, síðani álitið um fátækramark varð almannakunngjørt í 2014, so tað ber ikki til at peika á serligar familjutýpur í samfelagnum, sum eru serliga illa fyri.

Tað er í ein ávísan mun vanligar familjur, sum eru í eini støðu, sum ger at príshækkingarnar raka serliga hart. Tað kann vera í sambandi við støðuna á bústaðarmarknaðinum, tað kann vera øktar útreiðslur til brennievni í sambandi við koyring til og frá arbeiði o.m.a. Hetta eru familjur, sum ikki hava samband við Almannaverkið, og tí ber ikki til hjá landsstýrismanninum at meta um, á hvønn hátt príshækkingarnar ávirka tal av familjum, ið hava tørv á stuðli fyri at liva eitt sámiligt lív.

Almannamálaráðið, 7. juni 2022

Sólvit E. Nolsø
landsstýrismaður